## Framstig fyri javnstøðu í ES

**Nýggjur sáttmáli skal tryggja, at limalondini arbeiða fyri javnstøðu**

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Javnstøða millum kvinnur og menn er avgerandi fyri búskaparliga vøksturin í ES. Tað siga seks stjórnarleiðarar, sum hava skotið upp, at ES fær ein felags javnstøðusáttmála. Millum stjórnarleiðararnar, sum hava tikið stig til uppskotið, eru danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, umframt stjórnarleiðararnir fyri Svøríki, Spania, Frakland, Finland og Tjekkia. Teir siga, at sáttmálin skal tryggja, at øll limalondini arbeiða miðvíst fyri at økja um kvinnuluttøkuna á arbeiðsmarknaðinum, og at styðja javnstøðu millum kynini.

Í sambandi við sáttmálan skal ein nýggjur evropeiskur stovnur fyri kyn og javnstøðu setast á stovn. Uppskotið til tann Evropiska javnstøðusáttmálan verður viðgjørt í Evroparáðnum í vár.

## Týsk kvinna tók stig til kvinnudagin

Í dag er 8. mars, og verður altjóðakvinnudagurin hátíðarhildin um allan heim.

Kvinnudagurin varð grundaður á einum altjóða sosialistiskum kvinnufundi í Keypmannahavn 1910. Tað var tyska Clara Zetkin, sum kom við hugskotinum um ein dag, har kvinnurættindi vóru í hásæti.

Fyrstu árini var dagurin hildin ymisar dagar á várið, men aftaná nøkur ár, varð avgjørt at dagur skuldi vera 8. mars á hvørjum ári.

Í nógv ár vóru tað bara sosialistiskir kvinnubólkar, sum hildu dagin. Men í seinna parti av 1960'unum, tá kvinnurørslan gjørdi um seg, tóku reyðsokkar dagin til sín og nýttu tær hann eitt nú til at krevja fría fosturtøku og barnaansing til øll.

Nú verður dagurin hildin um allan heimin. ST gjørdi í 1977 eina samtykt, sum mælir til, at øll skullu halda kvinnudagin, og hareftir tóku tey flestu undir við degnum. Í 1980 lýsti ST 8. mars til altjóða kvinnudag. Í nógvum londum er 8. mars heiligdagur.

**IT.**

# Altjóða Kvinnudagur í Havn

**Tey, sum hava hug, kunnu gera nógv burturúr at hátíðarhalda kvinnudagin í ár. Fyrst við einum leskiligum bita á Hotel Hafnia, og síðani uppi í Sjónleikarhúsinum, har Kvinnufelagið skipar fyri tiltaki**

8. MARS 2006
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kvinnufelagið og Hotel Hafnia í Havn eru farin saman um at hátíðarhalda altjóða kvinnudagin. Tey hava sett eitt tilboð saman, sum serliga er ætlað teimum, ið ynskja góðan mat, umframt eitt gott kjak.

### Kvinnubuffet

– Í sambandi við konsertina hjá Eivør, Guðruni og Lenu í Norðurlandahúsinum herfyri, borðreiddi vit við einum forkunnugum sjálvtøkuborði, sum var sett saman við kvinnugómum í huga. Hendan kvinnubuffetin varð sera væl móttikin, bæði av kvinnum og monnum, og tí avgjørdu vit at bjóða hana aftur í sambandi við tiltakið hjá Kvinnufelagnum, siga tey á Hafnia.

Nógvir spennandi rættir eru á skránni á stóra sjálvtøkuborðinum á Hotel Hafnia, eitt nú canapéir, salat, terta, fiskasuppa, smáar pannukøkur við skeljadjórafyllu, umframt sjokolátakøku og tiramisu omaná. Sjálvtøkuborðið verður millum kl. 17 og 21.

### Álvara og gaman í Sjónleikarhúsinum

Kvinnufelagið í Havn stendur fyri partinum av hátíðarhaldinum, sum verður í Sjónleikarhúsinum. Har verður ymiskt á skránni, eitt nú pallborðsfundur undir heitinum: Kvinnur í Politikki – hvussu fáa vit fleiri kvinnur valdar í løgtingið og í bý- og bygdarráðini? Tiltakið byrjar kl. 19.30 við vælkomudrykki og brellbitum í forhøllini, og Amnesty International Føroya deild hevur framsýning. Pallborðsfundurin verður kl 20, við Karin Kjølbro sum fundarstjóra. Tær, sum fara at manna pallborðið verða: Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna, Gunn Joensen, frv. borgarstjóri í Vestmanna, Malan Helgadóttir, bygdarráðslimur, Bjørg Jacobsen, skrivari í Javnstøðunevndini, Helena Dam á Neystabø, frv. landsstýris- og løgtingskvinna, Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna og Birta Biskopstø, forkvinna í Kvinnufelagasamskipan Føroya.

Eisini verður undirhald, har tær báðar Mia Káradóttir og Heiðrún Petersen spæla ávikavist floytu og violin, og Marjuni í Kálvalíð fer at framføra skemt.

Kostnaður fyri Kvinnubuffet og Sjónleikarhúsið er 250 kr. og borð skal bíleggjast á Hafnia. Tiltakið í Sjónleikarhúsinum kostar 100,- kr. og atgongumerki fáast við inngongdina.

# Fá hana at flenna og hon verður tín

**Ein maður kann verða ljótur, skitin og keðiligur – men fær hann kvinnuna at flenna, hevur hann hóast alt góðan møguleika at fáa konufólk. Ein nýggj kanning vísur nevnliga, at humor hevur stóran týdning, tá kvinnur velja sær maka**

KANNING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

”Fittur, erligur og stuttligur” – hetta eru tey vanligastu hugtøkini og ynskini tá støkum fólkum, tá tey søkja eftir maka í bløðum ella á alnótini.

Nýggjar kanningar í USA og Kanada vísa, at hjá monnum hevur tað lítlan týdning um kvinnan er stuttllig, meðan kvinnur blunda fyri nógvum, um maðurin bara er stuttligur.

– Okkara úrslit vísa, at humor ger fólk meira áhugaverd sum verandi maka, og at hetta hevur størstan týdning hjá kvinnum, sigur Eric Bressler, íð starvast á Westfield State College í Massachusetts, við Reuter tíðindaskrivstovuna.



Bressler hevur, saman við einum kanadiskum granskara, Sigal Balshine, gjørt eina kanning har teir bóðu kvinnur hyggja at myndum av monnum saman við einari lýsing av manninum sum antin var stuttliga ella álvarsliga skrivað. Síðani gjørdu teir tað sama við mannfólkini.

Tá bæði kvinnur og menn valdu, hvønn tey helst vildu hava sum mann ella konu var úrslitið greitt. Kvinnurnar valdu menn við tí stuttligu lýsingini, meðan menn valdu kvinnur við tí álvarsomu lýsingini.

Valið hjá kvinnunum kann tykjast eitt sindur løgi, tí bæði mennirnir og kvinnurnar í kanningini vóru samd um, at teir stuttligu persónarnir ikki tóktust eins álítandi, erligir ella klókir, sum teir álvaarsamu.

– Kvinnur velja mennirnir, hóast tær halda at teir ikki eru líka erligir ella álítandi, sum teir álvarsomu. Eisini velja tær heldur menn, sum hava lílan humor, fram um menn sum bert eru álvarsamir, siga Bressler og Balshine til Reuter tíðindaskrivstovuna.

Úrslitini av kanningini eru eisini at finna í blaðnum ”Evolution and Human Behavior”.

# Vilja kanna fruktbæri

**Í hesum døgum fáa íalt 3033 kvinnur í tretivunum eitt spurnablað um sambandið millum fruktbæri, kost og umhvørvi**

KANNING
*tíðindaskriv*

Kanningin er í tveimum. Eitt spurnablað til tær, ið ikki hava átt børn, og eitt til tær, sum hava átt. Hetta er ein partur av eini umfatandi kanning á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, sum hevur til endamáls at samanbera fruktbærið í Føroyum við onnur lond og at lýsa um umhvørvisviðurskifti hava týdning fyri fruktbærið.

Allar kvinnurnar hava fingið tvey spurnabløð, eitt grønt til tær, sum hava átt børn ella ganga við fyrsta barninum nú, og eitt blátt, sum er til tær, sum ikki hava átta børn.

Í grøna spurnablaðnum verður spurt um kvinnusjúkur og annað viðvíkjandi kvinnum, um kost, viðgongutíðir (graviditeter) og barnsburðir og møguligar trupulleikar at gerast upp á vegin. Eisini eru spurningar um møguligar trupulleikar hjá pápanum at børnunum. Vit hava eisini sett mammuni at kvinnuni nakrar spurningar. Tað kann av ymiskum orsøkum vera ringt at svara teimum spurningunum, men vit heita á kvinnuna, við ella uttan hjálp frá mammuni, at svara, so væl hon kann.

Bláa spurnablaðið setir somu spurningar um kvinnusjúkur, kost, mammuna, mannin, hon møguliga roynir at fáa barn við, og eisini um viðgongutíðir, tí ein barnleys kvinna kann hava verið uppá vegin, men ikki havt barnsburð.



*Kanningin verður gjørd í samstarvi millum grannskoðarar úr Keypmannahavn, Odense og í Føroyum*

Mammurnar at kvinnunum verða eisini spurdar um teirra kostvanar og ymiskt annað viðvíkjandi viðgongutíðini hjá kvinnuni, sum svarar. Tað er tí, at granskingarúrslit úr øðrum londum geva ábendingar um, at tíðin í móðurlívi ivaleyst hevur týdning fyri fruktbærið seinni í lívinum soleiðis at skilja, at hvussu mamman livdi, meðan hon gekk við dóttrini, kann hava týdning fyri, eitt nú, hennara fruktbæri í dag.

Kanningin er eitt samarbeiði millum granskarar frá Sjúkrahúsverki Føroya, Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn og Suðurdanska Universitetinum í Odense. Tey, sum mynda verkætlanarbólkin, eru professararnir Niels Erik Skakkebæk og Tina Kold Jensen, ljósmóðirin Anna Sofía Veyhe, heilsufrøðingurin Mari Ann Ellendersen og Pál Weihe, yvirlækni.

### Tíðarkrevjandi at svara spurnarblaðnum

Um ein slík kanning skal vera eftirfarandi, má hon vera nágreinilig, og helst skulu meira enn tveir triðingar hava svarað spurnabløðunum. Fyri at vera nágreinilig er tað neyðugt at koma við nógvum spurningum, og tí er spurnarblaðið vorðið so drúgt. Tað fer í miðal at taka umleið ein tíma at svara spurnablaðnum. Granskingarbólkurin vónar tó, at nógvar kvinnur fara at gera sítt til at ríka vitanina um fruktbæri føroyinga við at geva sær stundir til at svara spurningunum onkuntíð komandi vikurnar.